# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stríð um stavir

Seinastu tíðina hava vit verið vitni til eitt politiskt eljustríð um nakrar stavir, sum hava verið útihýstir úr føroyska stavraðnum.

Tað var Sjúrður Skaale, løgtingsmaður fyri Tjóðveldi, sum legði fram uppskotið um at geva stavunum c, x, z, q og w pláss aftur í føroyska stavraðnum – ella tað látínska alfabetið, sum tað eisini verður kallað.

Seinasta skotið kom frá Tórbjørn Jacobsen – eisini tingmaður fyri Tjóðveldi – sum spyr Helenu Dam á Neystabø, um danski stavurin »å« eisini fær innivist í føroyska starvraðnum. »Skal tað vera gildið, lat tað so verða gildið«, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum kallar partamannin hjá sær, Sjúrð Skaale, fyri »parlamentariska hirða hjá Málfelagnum«.

Ikki sørt niðrandi viðmerking frá einum av okkara kosnu monnum, sum eisini heldur sera hánt um, at nøkur fólk hava tikið seg saman í eitt málsligt felag, hvørs endamál ikki samsvarar sjónarmiðnum hjá Tórbjørn Jacobsen.

Vit kunnu samstundis spyrja, hvat tað er, sum fær tingfólk at brúka so nógva orku upp á eitt so lítið mál – og enn minni, hví allar slíkar hugsanir, sum eitt nú Sjúrður Skaale og Málafelagið hava ført fram, skulu kallast donsk imperialisma?

Tað tykir okkum sera undrunarvert.

Føroysk málrøkt líðir ongan skaða, um hesir fimm stavirnir finna vegin inn í okkara starvraðið. Um tú eitur Karl ella Carl er fullkomiliga líka mikið fyri okkara málsliga samleika. Um okkara politikarar veruliga ynskja at bøta um málsliga kunnleika okkara, so gera teir tað best við at geva læraraskúlanum frægari sømdir til at útbúgva lærarar í føroyskum, tí tað er í skúlanum, at grundarlagið verður lagt.

Best hevði tað kortini sømt seg øllum í hesum kjakinum, um fólk vóru høvisk og nýttu fólkalig argument. Nógvir føroyingar stara seg blindar upp á danir og danska samfelagið. Men fyri tað skulu fólk hava loyvi til at hava eina aðra meingin, uttan at verða kallað fyri danskir imperialistar. Hesum fólkunum eigur tað eisini at verða pláss fyri í Tjóðveldi.

Tað er Sjúrði Skaale til miklan heiður, at júst hann sum tjóðveldistingmaður hevur reist hetta málið.

**Sosialurin**

## Koyrið Heilsutrygdina aftur í skuffuna

**HANS PAULI HØJGAARD**
Form.
Nevndin fyri Nes
Sóknar Sjúkrakassa

**– og latið hana liggja har – í tað minsta til tit klára at krevja peningin inn yvir skattin**

**Háttvirdi tinglimur**
Bert nakrar viðmerkingar sum vit vóna vilja geva eftirtanka, nú lógin um sjúkratryggingina skal til viðgerðar í Tinginum.

Sum tygum vita, so hevur ætlanin um avtøku av sjúkrakassunum leingi verið á veg. Skiftandi landsstýrisfólk og samgongur hava havt hetta, meir ella minni á borðinum, nú í fleiri ára tíggir. Hóast ymist hevur verið hvussu »**barnið**« hevur sæð út, so er tó eitt ið øll árini hevur verið hitt sama:

»**Innkrevjingin skal um skattin.**« & »**Teir sterku herðarnir skulu bera mest**«.

Nú er so ætlanin at taka sjúkrakassarnar úr hondunum á teimum, ið, vilja vit póstanda, hava umsitið hesa skipan – tænastu fyrimyndarliga í yvir 100 ár, men tað ófatuliga er nú, at ætlanin at yvirtaka hesa skipan, uttan at hon skal um skattin. Á síðsta fundi sum vit í sjúkrakassunum høvdu við Aksel Johannesen varð landsstýrismaðurin spurdur, um hann sjálvur trúði, at innkrevjingin nakrantíð kom at fara yvir skattin. Til hetta svaraði hann greitt og týðuliga, nei, – fór so at fabla um nakað, ið hann kallaði: »Koppskatt« – og hvat skuldi tað annað verið í hesum **Kop 15** tíðum, – smart skal tað vera. Skal tað so kanska ongantíð yvir skattin? varð spurt.

Aftur var svarið hetta nýggja navnið, og segði hann seg hava funnið út av, at hesin formur fyri skatti varð brúktur onkra aðrastaðni við góðum úrsliti – ja, hann greiddi frá, at tá fólk í umsitingini nú høvdu kannað, hvussu nógvir persónar als ikki komu at gjalda nakað, um kravt varð um skattin, so vísti tað seg at vera eitt nógv stórri tal, enn roknað hevði verið við. Serliga var tað ein bólkur, ið hann rópti **rík – við góðari inntøku**, ið als ikki komu at gjalda nakað.

Men oman á øll rakstrarrópini og niðurgeringina av sjúkrakassunum, sum hevur verið, so má tað kennast sum ein ósigur, at tað so nógv hataða inngjaldið skal halda fram. So hvat er nú til ráða at taka.

Jú, tá er tað, at onkur lærdur kemur fram við orðinum »Koppskattur«.

Hokuspokus! **Vit kalla tað Koppskatt**.

So standa øll sum kánus og undrast um hetta fína navnið.

Sig so at lærdómur onki er verdur.

Tá vit nú í fjølmiðlunum hoyra, hvussu Aksel umaftur og umaftur heldur fram, at alt skal fáast upp á pláss innan fyri eitt tíðarskeið upp á tvey ár, so er hetta onki annað enn eitt spæl fyri »gallarínum«.

Tá vit senda tygum hesar reglurnar, so er tað tí, at vit eru vald at taka okkum av áhugamálunum hjá teimum limunum, ið hoyra til okkara sjúkrakassa, og vit kenna okkum als ikki sannførd um, at tann nýggja skipanin verður eins góð og tann verandi; tvørtur ímóti so sær tað út til at blíva ein verri skipan.

**Limagjaldið fer upp**
Tænastan verður verri

Ætlanin sær út til at vera, at skipanin kann (skal) broytast aftur og aftur, alt eftir hvør er landsstýrismaður.

Í Danmark er tann almenna skipanin í dag so útholað, at flestu fólk als ikki rokna hana uppí, tá talað verður um sjúkratrygging, og tí eru í dag yvir 2 mill. danskarar umframt børn, limir í tí privatu tryggingini.

Gud viti, hvussu skilið við tíðini kann blíva her í Føroyum, tí um Aksel Johannesen fær sín vilja, so skal bert hendan almenna tryggingin fáa loyvi at virka.

So leingi sum sjúkrakassarnir hava verið til, hevur málsetningurin hjá teimum, ið hava umsitið og varðað av hesum stovnum verið, at halda allar útreiðslur, tá hugsað verður um umsiting o. l. so lágt niðri sum møguligt, – men longu nú frættist um fleiri stýrir og ráð av høgt løntum fólki í umsitingini. Hetta meta vit gevur grund til stúran, og vit meira enn hóma eina dýra umsiting.

Okkara áheitan á tykkum her til seinast skal vera: Koyr hatta í skuffuna og lat tað liggja har – í tað minsta til tit klára at krevja peningin inn yvir skattin.

Til seinast vilja vit nevna tí út av lagi ringu viðferð, okkara starvsfólk hava fingið. Tað kann ikki vera fremmant fyri nøkrum, men at Aksel Johannesen sum eitt síðsta spark, helst tí at sjúkrakassarnir ikki góðvilliga góvu honum ognirnar, soleiðis sum hann kravdi tað, fór út í fjølmiðlarnar og segði seg ikki kunna lova nøkrum av teimum arbeiði framyvir, tað ber prísin. Makan til viðferð skal leitast leingi eftir.

## Vilja føringar ikki eiga Hattonbank?

**BJARTI THOMSEN**
Nólsoy



Í føroyskum atlasi er Baileybanki blivin til Ytribanki og Lúsabanki til Ytstibanki. Kundi hugsað mær at vita, hví hetta er broytt, og hvaðan nýggju nøvnini stava. Helst ber illa til at krevja ognarrætt til tað sum er uttanfyri Ytstabanka. Nevndin, sum fyrireikar føroyskt krav um sjóøki suður eftir Hattonbanka, kann tí sparast burtur. Ella er kanska ætlanin at kalla Hattonbanka fyri Allarytstibanki. Fjákutu nøvnini í føroyska atlasinum vóru betur ógjørd.

Sama er skilið, tá børn skulu doypast. Her tók ein elita sær rætt til at siga, hvussu børn skuldu eita. Abbin, sum eitur Henning, kundi ikki kallast upp, tí barnið skuldi partú eita Henningur. Nógvir vanligir navnamøguleikar eru burtur, tí trongskygda elitan hevur bannlýst fleiri føroyskar stavir. Tað nýggjasta er, at nøkur útvald skulu fáa framíhjárætt til ávís nøvn til síni børn. Skulu ikki øll verða líka fyri (navna)lógini?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støдd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.